# Vælferðarsamfelagið kemur ikki av sær sjálvum

*Og tað er skjótt við skeivum ella vantandi politiskum avgerðum at taka stuðlarnar undan vælferðarsamfelagnum.*

- Fólkaskúlin er vælferðarvøggan og grundstøðið undir øllum samfelagsskipanum og skal raðfestast.
- Heilsuverk og almannaverk er ein ómissandi karmur, og skal somuleiðis raðfestast.
- og bert búskaparligur vøkstur kann tryggja, at samhaldsfasta samfelagsskipanin mennist og veksur.

Men tað eru nøkur svørt skýggj í sjónarringinum. Tey boða frá, at álvarsamt ólag er komið á fólkasamansetingina í Føroyum. Tað eru í dag 2.000 færri kvinnur enn menn í aldrinum millum 24 og 39 ár. Gera vit einki við gongdina, so verða tað kanska 3.000 færri ungar kvinnur um fá ár. Hevði hetta verið í Danmark, so manglaðu 300.000 kvinnur. **Hetta eru tøl so stór sum ein náttúruvanlukka.**

Avleiðingin av risastóru fráflytingini verður, at tað verða alt ov fá børn, og alt alt ov fáar vinnuførar hendur til at bera vælferðarsamfelagnum uppi – eitt nú almannaverki og eldrarøkt. Gera vit einki, kann henda gongd taka grundarlagið undan vælferðarsamfelagnum.

Ein stakur uppihaldari, sum vil útbúgva seg og brúka sína útbúgving og sín førleika, hevur **ongan** møguleika at fáa endarnar at røkka saman, tá ið húsaleiga, el, olja, stovns-pláss og skattur er goldin. Als ongan! Sjálvt hjá ungari familju er tað nærum ógjørligt. Millum annað tí velja serliga ungar kvinnur at flyta.

Henda gongdin kann bert broytast, um vit **velja** at gera Føroyar áhugaverdar at búgva í hjá okkara unga fólki.

- Dupultan lestrarstuðul til einsamallar uppihaldarar
- 12 mánaða barsilskipan – sum eisini pápar fáa lut í.
- Bústaðarpakkin setast í verk beinan vegin.
- Fjølbroyttur og liðiligur arbeiðsmarknaður í øllum landinum, ið kann sameinast við broytt familjumynstur.

Hesum fari eg at berjast fyri.

*Helena Dam á Neystabø*



helena.fo JAVNAÐARFLOKKURIN

# Lærarin er svarið - ikki spurningurin

Eg hugsi ikki, at tað var neyðugt við fleiri PISA-kanningum, fyri at staðfesta, at fólkaskúlin má raðfestast **NÚ**. Tað hava lærarar og onnur við skili fyri fólkaskúlanum sagt í áravís, men eingin hevur lurtað.

Ferð eftir ferð er prógvað, hvussu umráðandi tað er fyri úrslitið hjá einari fyritøku, at ein virkin starvsfólkapolitikkur verður førdur. At starvsfólkini kenna seg vird, og at tað verða gjørdar íløgur í starvsfólkið. Fólkaskúlin er einki undantak.

Lærarastættin hevur brúk fyri útbúgving og eftirútbúgving. Ikki bert sum eitt tilboð, men sum eitt førleikagevandi krav. Lærarar og næmingar hava brúk fyri amboðum, dagførdum undirvísingarmiðlum og nútímans KT-skipanum. Og tey sum starvast í skúlanum, hava brúk fyri tíð til at loysa tær alsamt størri uppgávur, sum verða álagdar skúlanum.

Eysturoyggin er fyridømi um, hvussu væl tað kann eydnast at skipa fyri sernámsfrøðiligari tænastu í einum øki í landinum. Vit skulu læra av hesum, og seta líknandi skipanir í verk kring landið.

Vit skulu byrja við tí tilfeinginum, sum eftir stuttari tíð kann útinna tey størstu avrikini - nevniliga lærarunum.

**Allir lærarar skulu fáa miðvísa eftirútbúgving, og lærarútbúgvingin skal upp á master stig.**

*Helena Dam á Neystabø*

# Fiskurin er ogn Føroya Fólks

**Ein nýggjur fiskidagamarknaður skal hava sum endamál at umsita og umseta tilfeingi føroyinga eins og tryggja búskaparvøkstur.**

Við at stovnseta ein Fiskidagamarknað, kunnu vit tryggja opinleika og dynamikk í fiskivinnuni, tryggja, at náttúruskapta ríkidømið verður umsitið sum ogn Føroya Fólks, at handilsligar treytir verða galdandi, fyribyrgja at peningalig spekulatión kemur í fiskirættindini, eins og tryggja, at øll vinnufús fáa møguleika fyri at fara undir vinnuligan fiskiskap í Føroyum.

Finnast má sjálvsagt fram til eina hóskandi umskiftisfarleið, soleiðis at fólk, ið hava handlað í góðari trúgv og út frá galdandi lóggávu, ikki verða verri stillað.

**Onkur skal fíggja hesa millumrokning**

At eisini tey, sum starvast í vinnuni, eru farin at kenna sviðan av órættvísu skipanini, kom fram, tá ið Skipara- og Navigatørfelagið herfyri alment boðaði frá, at manningafeløgini ikki longur kunnu liva við, at fiskirættindi og fiskidagar verða keypt og seld fyri so ovurhonds stórar upphæddir. Tað verða manningarnar, sum í seinasta enda koma at rinda fyri, at rættindi til at fiska verða so himmalrópandi dýr.

Vinnupolitiskt er avgerandi at fáa loyst hetta mál.

*Helena Dam á Neystabø*

# Skúlaverkið og umhvørvið á dagsskránna



SVENN Ó. OLSEN
*Valevni Sambandsfloksins*

Vit í Føroyum skulu seta okkum sum mál at hava heimsins besta skúlaverk

Hvussu gera vit tað?

Fyrst av øllum eiga vit at seta okkum ein greiðan málsetning, um hvat og hvønn veg vit skulu fara. Er PISA málsetningurin? Ella finst onkur betri? Í øllum førum mugu vit vita hvat vit miða ímóti.

Nógv er ið kann gerast væl betur enn nú.

Fyrst av øllum eigur lærarautbúgvingin at endurskoðast. Er nakað vit kunna betra, gera øðrvísi?

Nútímans undirvísingartilfar skal gerast til allar lærugreinar í øllum aldursbólkum. Tá hetta er nátt, skal tilfarið støðugt viðlíkahaldast, so vit altíð eru í fremstu røð

Lærarar skula fáa regluliga endurútbúgving, lætta atgongd til nýggjasta undirvísingar tilfar og góð amboð til undirvísingina.

Kommunurnar partur er at byggja skúlar, og her eru stór framstig hend seinastu árini, nú manglar bert at fáa tann almenna partin við. Um viljin er til staðar gerst nógv eftir stuttari tíð.

Eg havi viljan, tú kanst geva mær møguleikan.

Ikki einans skúlin skal betrast, eisini umhvørvi treingir onkran við nýhugsan í Løgtingið

Kyoto sáttmálin er ikki ein forðan, men ein gyltur møguleiki, at seta tiltøk í verk. Nú hava vit eitt mál at miða í móti, og so er bert eftir at fara til arbeiðis.

Nøkur mál sum eg fari at arbeiða fyri, at fáa framd í verki til tess at betra um umhvørvi, eru:

Bjálva íbúðir og sethús betri, veita stuðul til alternativar orkukeldur til sethús, øll almenn bygging skal hava eitt minsta krav til alternativar orkukeldur, verandi almennir bygningar – skúlar, skrivstovur og stovnar - av ávísari stødd, skulu innan 10 ár hava minst 30 % av orkuni frá alternativum orkukeldum, lækkað avgjaldi á orkusparandi akførum, seta umhvørviskrøv til skip - sjálvandi í samráð við vinnuna – og arbeiða fyri at vit broyta hugburð til umhvørvi.

**Heldur enn at renna undan krøvunum frá heimssamfelagnum, eiga vit at ganga undan við loysnunum.**

Fái eg tygara álit tann 19 jan. fari eg saman við Sambandsflokkinum at stríðast fyri at Føroyar gerast undangonguland, tá umræður útbúgving og umhvørvi.

**Gott val**